gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Ferðafólk fáa høvi at síggja nútíðarlist

**Zacharias Heinesen, listamaður, heldur, at summarframsýningin er eitt gott høvi hjá føroyskum listafólkum at sýna fram nútíðarlist fyri útlendskum ferðafólki**

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Leygardagin kl. 14 letur summarframsýningin upp, og tað eru fjúrtan viðurkend føroysk listafólk, sum eru við. Norðurlandahúsið er karmur um framsýningina, og næstan alt húsið verður brúkt til at hýsa málningunum.

Listafólkini hava fingið boð um framsýningina í góðari tíð, og tískil eru tey flestu listaverkini gjørd júst til hesa framsýningina, sum hevur samband við ta stóru listastevnuna í august.

Summarframsýningin verður hangandi í Norðurlandahúsinum í góðar tveir mánaðir. Tí verður gott høvi hjá útlendskum ferðafólki, sum ofta leggja leiðina í Norðurlandahúsið, at fáa innlit í føroyska nútíðarlist.

Møguleikarnir hjá føroyskum listafólki at sýna fram nútíðarlist eru ikki so góðir. Tí fáa fleiri listafólk mangan vitjan av ferðafólki heima í sínum atelieri, har tey vilja síggja, hvat rørist í føroyska listaheiminum.

Tað sigur Zacharias Heinesen, sum er ein av listafólkunum, ið sýna fram í Norðurlandahúsinum. Hann vísir samstundis á, at ferðafólk hava stóran áhuga fyri nútíðarlisitni í Føroyum, og tey sakna hana.

Hann greiðir frá, at talan mest er um abstraktar málningar, ið eru at síggja. Hetta er eitt rák innan føroyska listaheimin, sum ger seg alt meira galdandi, og tey flestu mála bara abstrakt. Tað er næstan óvanligt at síggja ein málning, har tað ber til at siga nágreiniliga, hvat málningurin skal ímynda.

## Mest málningar

Talan er mest um vanligar málningar, sum eru á listaframsýningini. Onnur listaverk eru ikki so væl umboðað. Tó er onkur glotti at hóma.

Glasfuglarnir hjá Tróndi Patursson, sum vóru við á Várframsýningini eru við, og Tita Winther hevur gjørt eina nót úr mannahárum.

Annars sigur Zacharias Heinesen, at Norðurlandahúsið ikki er tað besta til at sýna fram málningalist, men hinvegin er hetta eitt hús, har nógv fólk kemur hvønn dag.



*Gjørt verður klárt til summarframsýningina, sum byrjar leygardagin kl. 14*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fiskamarknaður í gongugøtuni

Leygardagin 9. juni frá klokkan 10 til 16 verður fiskamarknaður í gongugøtuni í Havn. Tað er 2. flokkur á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, ið verður í gongugøtuni og selur alskyns fiskavørur.

Fólk kunnu keypa gullaksafars, rækjur, havtaskusporl og laks. Tey hava fingið vøruna bíliga frá virkjum, og tí er prísurin lægri enn vanligur handilsprísur.

Peningurin frá søluni skal nýtast til eina námsferð hjá flokkinum.

# - Berið ikki ótta fyri oljuvinnuni

**– Skal eg geva føroyingum góð ráð í sambandi við komandi oljuvinnuna, so vil tað vera at taka hana sum eina positiva avbjóðing. Berið ikki ótta fyri hesi vinnu men brúkið hana heldur til nakað gott. Vilja tit tað kunnu tit fáa ein sunnan og skilagóðan útvikling sigur Gordon McIntosh, stjóri fyri búskaparligari menning hjá býráðnum í Aberdeen**

OLJA OG ÁVIRKAN
*Jan Müller*



*Umboð fyri myndugleikar og vinnuna í Aberdeen á fundi á Hotel Føroyum, har tey verða kunnað um oljutilgondina í Føroyum.*

*Mynd Jens K. Vang*

Hann umsitur í dag eitt tað týdningarmesta starvið hjá býarmyndugleikunum í Aberdeen. Hann stendur á odda fyri búskaparligu menningini í tí býi, sum oftani verður nevndur hin europeiski oljuhøvuðsstaðurin. Talan er um Gordon McIntosh, sum eisini hevur arbeitt í oljuvinnuni í mong ár. Hann metir seg tí kunna vera ein góðan eygleiðara og ráðgeva, nú føroyingar skulu til at seta hol á ein oljuútvikling, sum Aberdeen hevur verið ígjøgnum í 25 ár.

Gordon McIntosh hevur júst vitjað í Føroyum saman við umboðum fyri fleiri fyritøkur í Aberdeen. Vitjanin er liður í tí samstarvi, sum borgarstjórarnir í Tórshavn og Aberdeen løgdu lunnar undir fyri tveimum árum síðani á oljuráðstevnuni í Aberdeen. Tá var eitt skjal undirdskrivað, sum sigur, at býirnir báðir og vinnurnar í báðum býum skulu knýta tættari samstarv. Her er so bæði talan um oljuvinnu, mentan, samferðslu oa.

Gordon McIntosh sær stórar møguleikar fyri øktum samstarvi millum Føroyar og Bretland, nú ein heilt nýggjur oljulandslutur er við at taka seg upp á havleiðunum millum londini. Hann heldur tað eisini vera heilt náttúrligt, at føroyingar vilja samstarva við eitt nú fyritøkur í Aberdeen og Skotland annars, tí vit eru næstu grannar. Hann dylur heldur ikki fyri, at oljuídnaðurin í Skotlandi sær stórar møguleikar við at knýta tættari samstarv við føroyingar og leggur stóran dent á, at talan verður um samstarv og ikki um at teirra fyritøkur skulu einsamallar fara inn at veita tænastur og vørur. – Vit kenna lógirnar og krøvini um føroyska luttøku í oljumenningini uttanat og hava lagt okkum hesi sera væl í geyma. Vitjanir sum henda og tær sum fara at koma í kjalarvørrinum á boringini vilja tí allar hava fyri eygað at knýta sambond við føroyskar fyritøkur og myndugleikar.

Við á ferðini hesaferð hava eisini verið umboð fyri Robert Gordon University, sum hava eitt ynski um at fáa føroyingar til Aberdeen á skeið ol. Nøkur av skotsku feløgunum hyggja eisini longur frameftir og eru við at fyrireika seg til tað, sum fer at henda um eini 3-4 ár, tá farast kann undir møguliga framleiðslu. Gordon McIntosh sigur annars, at ein tann mest týðandi fortreytin fyri samvinnuni er rutan hjá Atlantsflog til Aberdeen. Hana heldur hann vera sjálvan grundarsteinin undir tí komandi samstarvinum. Annars fara teir at gera nógv burtur úr Føroyum á komandi oljuráðstevnuni í Aberdeen í september. Tá verður m.a. ein serstakur føroyskur dagur á básinum hjá býráðnum í Aberdeen. Í býráðnum í Aberdeen raðfesta tey samvinnuna við Føroyar so mikið nógv, at tey hava sett Føroyabólk við 7 fólkum, sum bara arbeiða við føroyskum málum. Gordon McIntosh vísir annars á, at bæði býráðini vilja umhugsa møguleikan fyri at seta á stovn ein grunn, sum skal hava til endamál at eggja ungdómi at vitja hjá hvørjum til eitthvørt tiltak.

## Berið ikki ótta

Gordon McIntosh, sum hevur vitjað í Føroyum fleiri ferðir, fær oftani spurningin: hvørjar avleiðingar oljuvinnan hevur havt fyri Aberdeen! Hann sigur, at hon hevur havt sera positiva ávirkan og hevur hann tey ráð at geva føroyingum ikki at bera ótta fyri hesi vinnu. – Tit hava einki at vera bangin fyri, tí henda vinnan og tey fólkini har virka, kunnu tvørturímóti verða mennandi fyri tykkum og ikki minst tykkara mentan. Oljufólk eru oftani væl útbúgvin og motiverað fólk, sum hava stóran áhuga fyri nettupp mentan og eru góð við mentanina. Vit í Aberdeen vóru í so bangin fyri oljuvinnuni, tá hon tók seg upp her fyri 25 árum síðani. Tí míni ráð til føroyingar: takið væl ímóti hesi avbjóðing og verið opnir fyri henni. Tað kann í síðsta enda bara gagna tykkum sigur Gordon McIntosh, sum vísir á, at einki stendur í stað. Alt broytist og tað er at fáa tað skilabesta burtur úr broytingunum. Oljuvinnan er ein altjóða vinna eins og sigling og sjóvinna. Føroyingar eru vanir við at vera í sjóvinnuni og tá oljuvinna í so stóran mun fevnir um sjóvinnu skuldi tað verið heilt náttúrligt fyri føroyingar at kunna troytt hana til egið gagn. Tá talan er um fiskivinnuna og aðrar vinnur í Skotlandi, so metir Gordon McIntosh, at oljuvinnan hevur havt positivar avleiðingar. Hon hevur verið við til at gera vinnuna sum heild meira fjølbroytta. Og hetta kann eisini henda í Føroyum, um føroyingar ynskja tað.

Gordon McIntosh ivast annars ikki í, at oljuvinnan fer eisini at hava aðrar positivar avleiðingar fyri Føroyar. Hon fer at økja um talið á ferðafólki, sum fer at leita sær til Føroya úr øllum Stórabretlandi.

Tað er Aberdeen City Council, sum hevur skipað fyri hesi ferðini og hevur tað fingið hjálp frá Oljuvinnufelagnum og oljufelagnum Agip. Týsdagin var annars fundur í Havn, har umboð fyri Oljumálastýrið, einstøk oljufeløg, TK-stovuna og virkisráðgevingina hjá Agip greiddu útlendsku gestunum frá gongdini og hvat liggur fyri framman.



*Súsanna Sørensen frá Oljumálastýrinum greiddi á skilagóðan hátt frá gongdini í oljumálinum fram til í dag. Hon nevndi m.a. nógv umrøddu tilbúgvingina og segði, at her var nú alt komið uppá pláss. Hon segði eisini, at so skjótt stýrið og ráðgevar tess eru liðug við at viðgera boriumsóknirnar verða boriloyvini latin.*

*Mynd Jens K. Vang*

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 108 • leygardagur • 9. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 31 | 15 -12- 4 | 51 | 26 | 25 | 57 |
| 2 | Brøndby | 31 | 16 - 7 - 8 | 68 | 38 | 30 | 55 |
| 3 | Silkeborg | 31 | 14 -11- 6 | 44 | 32 | 12 | 53 |
| 4 | FCM | 31 | 13 -10- 8 | 47 | 42 | 5 | 49 |
| 5 | Viborg | 31 | 13 - 7 - 11 | 49 | 36 | 13 | 46 |
| 6 | AaB | 31 | 12 -10- 9 | 49 | 45 | 4 | 46 |
| 7 | Lyngby | 31 | 12 - 8 - 11 | 39 | 48 | -9 | 44 |
| 8 | OB | 31 | 12 - 7 - 12 | 46 | 43 | 3 | 43 |
| 9 | AGF | 31 | 12 - 4 - 15 | 48 | 56 | -8 | 40 |
| 10 | AB | 31 | 7 -14- 10 | 39 | 40 | -1 | 35 |
| 11 | Herfølge | 31 | 6 - 9 - 16 | 39 | 61 | -22 | 27 |
| 12 | HFK å Sønderj. | 31 | 1 - 7 - 23 | 28 | 80 | -52 | 10 |

# Todi kapprennur við tíðina

*Um Todi er á beinkinum, á vølllinum ella als ikki er við, verður ikki avgjørt fyrr enn leygardagin*



**Ikki fyrr enn leygardagin verður gjørt av, hvørt Todi Jónsson verður tøkur til gullbrakið móti Brøndby**

DM-GULL
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Keypmannahavn*

Spenningurin er øgiligur í danska høvuðsstaðnum, nú avgerðin um gullmerkini í donsku superliguni skal fall. Dysturin stendur sum kunnugt millujm sigursvanda Brøndby, sum tó ikki hevur vunnið so nógv seinnu árini, og so FCK við Toda Jónsson á liðnum.

Størsta ivamálið í løtuni tykist tó vera, um føroyska álopsessið yvirhøvur fer at taka lut í stóra gullbrakinum. Í dystinum móti Lyngby fyri úti við tveimum vikum síðani fekk Todi ein vøddaskaða, og varð tí noyddur at fara av vøllinum. Kanska er tað lagnunnar speisemi, at hesin skaðin skuldi koma tríggjar dagar eftir avgerðina hjá Toda at geva avboð til landsliðið, orsakað av vandum fyri skaðum.

## Skjótti troyttur

Fyrst var ótti fyri, at talan var um ein fipurskaða, men hetta var tíbetur ikki so. Talan er um toygging í lærvøddanum, sum ikki er eins álvarsligt, men tað er tó langt ífrá víst, at Todi verður tøkur sunnudagin.

- Eg havi vant alla vikuna. Týsdagin slapp eg fyri fyrstu ferð at renna rættuligt, og mikudagin varð lærið at testað 100% við spurtum og øðrum. Hósdagin vandi eg so fyri fyrstu ferð saman við hinum, og hóast tað gekk hampuliga væl, so noyddist eg at gevast eftir 20 minuttum. Ikki tí skaðin breyt upp, men eg kendi beinan vegin møði í vøddunum, og so helt eg tað vera betri at gevast.

- Eg havi koyrt nógv á, fyri at koma fyri meg aftur, og allar helst er tað av hesum, at vøddin er somikið eymur. Enn dugi eg ikki at siga, um eg verið tøkur sunnudagin. Tað verður helst ikki avgjørt fyrr enn í morgin, segði Todi, tá vit prátaðu við hann fríggjamorgunin.

## Spenningurin

Nú tíðin av álvara styttist til gullbrakið, er einki at dylja yvir, at hetta er nakað, sum nógv fólk í danska høvuðsstaðnum hugsa um, og hetta ásannar Todi Jónsson eisini.

- Spenningurin er øgiligur. Ikki minst tí tað nú eru 14 dagar síðani seinasta dystin, so tað hevur leingi verið greitt, at talan fór at verða um gullbrak.

- Burtur sæð frá at landsdystirnir eru komnir væl við, tí eg havi fingið betri tíð at koma fyri meg, so hevur hetta eisini gjørt tað eitt sindur lættari hjá okkum, tí at kalla allir fjølmiðlarnir bara hava hugsað um landsliðið. Nú eru hesir dystir lidnir, og alt fyri eitt eru teir aftur farnir í hold við okkum.

- Hetta er eisini nakað, sum fólkini í býnum leggja merki til. Ikki soleiðis, at tey koma yvir at práta við meg, men um onkur ber eyga við meg, kunnu tey væl finna upp á at rópa »kom så Todi!«.

- Hetta er sjálvandi nakað, sum ger tað enn stuttligari hjá okkum, men hetta er ikki nakað, sum tekur konsentratiónina frá okkum á nakran hátt. Heldur minnir hetta okkum á týdningin á uppgávuni. Vit hava møguleika at vinna DM-gull í Parkini, og eg kann ikki ímynda mær eitt betri stað at gera hetta. At tað so kann gerast í dysti móti Brøndby við fullsettum áskoðaraplássum, er bara heilt fantastiskt, sigur Todi at enda, áðrenn farið varð inn til seinastu venjingina.

Sum sagt, so verður avgerðin um Toda ikki tikin fyrr enn leygardagin. Sunnudagin verður gullbrakið móti Brøndby, og í týsdagsblaðnum kunnu lesararnir lesa meira um, hvussu hetta gekk fyri seg.